# ÁLIT

## YVIRTØKA AV UNDIRGRUNDINI

# III

## MØGULIGAR RÁEVNISSKIPANIR

# Møguligar ráevnisskipanir

1. **Setningur nevndarinnar.**

2. **Formligi karmurin um eina skipan.**
2.1. Heimastýrislógin.
2.2. Formalisering av semju millum ríkisstýrið og heimastýrið um undirgrundina.

3. **Nakrir høvuðsspurningar at samráðast um.**
3.1. Inngangur.

3.2. Formligt ræði.
3.2.1. Inngangur.
3.2.2. Yvirvaldsrættur ("højhedsret").
3.2.3. Lóggávuvald.
3.2.4. Fyrisitingarvald.
3.2.5. Viðurskiftini við útheimin.

3.3. Orkupolitikkur.
3.3.1. Inngangur.
3.3.2. Orkupolitiskar metingar um nýtslu av føroysku undirgrundini.

3.4. Samfelagsbúskapur.

3.5. Fíggjarviðurskifti.
3.5.1. Inngangur.
3.5.2. Útreiðslur av málsøkinum "ráevni í undirgrundini".
3.5.3. Býti av útreiðslunum við aðrar.
3.5.4. Inntøkur landskassans.
3.5.4.1. Inngangur.
3.5.4.2. Avgjøld.
3.5.4.3. Beinleiðis og óbeinleiðis skattir.
3.5.4.4. Tað almenna við í útvinning.
3.5.4.5. Ríkisins áhugi í inntøkunum.

3.6. Vinnumøguleikar.
3.6.1. Inngangur.
3.6.2. Vinnumøguleikar í sjálvum útvinningarvirkseminum.
3.6.2.1. Fyritøkur.
3.6.2.2. Arbeiðsmegi.
3.6.3. Óbeinleiðis vinnumøguleikar.
3.6.4. Føroyskt/danskt oljufelag.
3.6.5. Samandráttur.

3.7. Umhvørvi.

3.8. Árin á samfelagið.

4. Útinningarreglur.
4.1. Inngangur.
4.2. Útgangsstøði: Málið er sermál.
4.3. Treytir ríkismyndugleikanna.
4.4. Mannagongd.

5. Samandráttur.

1. Setningur nevndarinnar.

Í skrivi frá 28.12.1987 setir løgmaður hesa kanningarnevnd, sum m.a. verður biðin um: "..... at koma við uppskoti til eina samarbeiðsavtalu millum landsstýrið og ríkisstýrið um fyrisitingina av undirgrundini, og sum gevur Føroyum endaliga avgerðarrættin til møguliga útvinning av ráevnum úr føroysku undirgrundini, soleiðis at málsøkið "ráevni í undirgrundini" eftir avtalu við ríkisstýrið gerst sermál."

Í frágreiðingini um ríkisrættarlig og stýrisskipanarlig sjónarmið verður m.a. umrøtt, hvat ið hent er í undirgrundarmálinum, síðan fyrra undirgrundarnevndin kannaði málið í 1985. Har verður víst á, at tað samráðingarumfarið, sum var í mai 1986 millum ríkisstýrið og heimastýrið um undirgrundina avdúkaði, at partarnir standa ógvuliga langt hvør frá øðrum.

Síðan tá hava sum kunnugt ongar samráðingar verið og heldur ikki eru skriv farin partanna millum.

Undir hesum umstøðum metir henda nevnd tíðina ikki at vera búna til at gera nakað fullfíggjað uppskot til sáttmála millum Føroyar og Danmark um yvirtøku av undirgrundini.

Á verandi stigi metir nevndin tað vera rættast at royna at gera eina frágreiðing um, í hvørjum líki og við hvørjum innihaldi, ein møgulig ráevnisskipan kann lúka treytirnar, ið ásettar eru í setningi nevndarinnar.

Skal ein slík skipan gerast veruleiki, verður óivað neyðugt at hava fleiri samráðingarumfør við donsku stjórnina og kanska eisini við umboð fyri fólkatingið. Í slíkum samráðing-

um verður neyðugt frá føroyskari síðu at koma fram við nýggjum hugskotum, sum danskir politikarar og embætismenn higartil ikki rættiliga hava havt nakað serligt høvi til at umhugsa.

Tað er tí á núverandi stigi ógvuliga óvist, hvussu danir fara at taka ímóti nýggjum føroyskum hugskotum. Ikki fyrrenn vit hava havt høvi til at síggja, hvussu tey føroysku hugskotini verða móttikin, og hvat aftursvar tey fáa frá danskari síðu, ber til at meta um, hvussu eitt formligt uppkast til samarbeiðssáttmála eigur at vera orðað.

Niðanfyri verður roynt at kanna, í hvørjum líki ein skipan kundi verið gjørd. Síðan verður roynt at viðgera nakrar høvuðsspurningar, sum samráðingarnar um eina skipan helst fara at snúgva seg um.

## 2. Formligi karmurin um eina skipan

### 2.1. Heimastýrislógin.

Sum umrøtt í frágreiðingini um ríkisrættarlig og stýrisskipanarlig sjónarmið er grundarlagið undir eini møguligari skipan danska stjórnarskráin og føroyska heimastýrislógin.

Tað, ið føroyingar hava samráðst við danskar myndugleikar um og framvegis ynskja at samráðast um, er yvirtøka av málinum "ráevni í undirgrundini" sum sermál sambært reglunum fyri yvirtøku av B-málum.

Hesar reglur eru ásettar í § 3 í heimastýrislógini, sum ljóðar soleiðis:
"For de på B opførte sagsområders vedkommende afgøres der ved nærmere forhandling om og i hvilket omfang disse spørgsmål kan henføres til færøske særanliggender."

Sum nærri umrøtt í álitinum frá fyrru undirgrundarnevndini eru einstøk B-mál yvirtikin við ongum serligum treytum og onnur við treytum frá danskari síðu. T.d. í útvarpsmálum tilskilar danska stjórnin sær rættindi til framvegis at taka sær av ávísum altjóða útvarpsmálum. Eitt annað dømi er kongsjørðin, har ein treyt var, at landsstýrið skuldi yvirtaka nakrar bygningar (royndarstøðirnar) og ein onnur treyt, at jarðargrunnurin skuldi ikki verða niðurlagdur, uttan at ríkismyndugleikarnir vórðu spurdir.

Við tí nógva áhuga, sum ríkismyndugleikarnir hava sýnt undirgrundarmálinum, er hugsandi, at ríkisstjórnin bert kann ganga við til eina yvirtøku undir serstøkum treytum. Samráðingarnar verða tí m.a. at snúgva seg um, hvussu yvirtøkan formliga kann fara fram og hvat innihald donsku treytirnar skulu hava.

2.2. Formalisering av semju millum ríkisstýrið og heimastýrið um undirgrundina.

Yvirtøka av vanligum A-málum kann fara fram við, at landsstýrið t.d. boðar ríkismyndugleikunum frá, at málið verður yvirtikið sum A-mál. Galdandi ríkislóg verður tá verandi í gildi, men heimastýrismyndugleikarnir verða inntulkaðir ístaðin fyri ríkismyndugleikarnar.

Teir praktisku spurningarnir, sum stinga seg upp í sambandi við yvirtøkuna, verða avgreiddir við avtalum millum ríkismyndugleikarnar og landsstýrið. Slíkar avtalur kunnu hava ymiskan form alt eftir, hvussu týdningarmiklir spurningarnir eru. Talan kann bæði vera um skrivligar og munnligar avtalur ímillum politikarar og um skrivligar ella munnligar avtalur á embætismannastigi.

Tá ið talan nú er um eitt B-mál, sum hevur víst seg at vera ein ógvuliga týdningarmikil politiskur spurningur hjá báðum pørtum, má haldast, at ein semja partanna millum um, hvussu málsøkið "ráevni í undirgrundini" verður at skipa, má verða formaliserað annaðhvørt við lóggávu í løgtinginum og fólkatinginum ella við einum sáttmála millum ríkismyndugleikarnar og landsmyndugleikarnar, einum sáttmála, sum møguliga verður at leggja fyri bæði fólkating og løgting til góðkenningar. Ein loysn við bæði lóggávu og sáttmála er heldur ikki óhugsandi.

Helst er støðan ikki búgvin til at viðgera formligu spurningarnar gjøllari, fyrr enn nakað longur er komið áleiðis við samráðingunum partanna millum um innihaldið í eini semju.

## 3. Nakrir høvuðsspurningar at samráðast um

### 3.1. Inngangur.

Her verður roynt at viðgera nakrar av teimum høvuðsspurningum, ið roknað verður við, at ávikavist føroyskir og danskir myndugleikar leggja dent á, og sum tí kunnu fáa týdning í samráðingum um eina ráevnisskipan.

Fyrst er at nevna spurningin um tað formliga ræðið yvir undirgrundini. Hetta er spurningurin um, hvussu yvirvaldsrættur, lóggávuvald, fyrisitingarvald og viðurskifti við útheimin skulu býtast millum lands- og ríkismyndugleikarnar.

Síðan verður hugt at nøkrum meira ítøkiligum spurningum um nýtslu av ráevnunum í undirgrundini og ávikavist føroysku og donsku áhugamálunum teimum viðvíkjandi.

Dentur verður her lagdur á at lýsa tey hugsaðu føroysku og donsku áhugamálini. Roynt verður í ávísum førum at peika á gongdar leiðir til tess at sameina hesi sjónarmið ella at gera nakrar metingar um, hvørji sjónarmið hugsast kunnu at hava forrætt undir verandi ríkisrættarligu viðurskiftunum, havandi í huga hvønn dent partarnir leggja á teir ymisku spurningarnar.

Sum nevnt í inngangingum verður ikki her roynt at koma við uppskotum til sáttmálatekstir, men í ávísum førum peikað á gongdar leiðir at fáa semju um viðkomandi spurningar.

Undirgrundin undir føroyska landøkinum er sum kunnugt ógvuliga lítil og er tí neyvan stórur møguleiki fyri at finna áhugaverd ráevni har.

Ráevni, sum tað loysir seg at útvinna undir havbotni, hava higartil mest verið kol-

vetni (olja og gass). Tað er tí rættiliga náttúrligt, at tað júst eru kolvetni, ið havd verða í huga undir hesi gjøgnumgongd av ítøkiligum spurningum um nýtslu av ráevnum í undirgrundini.

Lagt verður fyri við orkupolitisku sjónarmiðunum hjá báðum pørtum. Eisini verður hugt eitt sindur at samfelagsbúskaparligum metingum, ið báðir partar kunnu gera sær um ráevnini í undirgrundini. Síðan verður farið í holt við fíggjarviðurskiftini, t.e. hvønn týdning nýtsla av ráevnum í undirgrundini kann fáa fyri útreiðslur og inntøkur hjá ávikavist landskassanum og ríkiskassanum.

Síðan verður hugt at beinleiðis og óbeinleiðis vinnumøguleikunum, ið útvinningarvirksemi førir við sær. At enda verður hugt at umhvørvisspurninginum og annars at tí árini, ið ein útvinning av ráevnum úr føroysku undirgrundini kann fáa á føroyska samfelagið sum heild.

## 3.2. Formligt ræði.

### 3.2.1. Inngangur.

Tað orðaskiftið, sum verið hevur bæði í Føroyum og í Danmark, tey skriv, sum send hava verið landsstýrinum frá donsku ríkismyndugleikunum og ikki minst tað, sum skrivað og sagt hevur verið um støðu ríkismyndugleikanna til grønlendsku undirgrundina benda øll á, at sjálvur spurningurin um formliga ræðið á undirgrundini hevur grundleggjandi politiskan týdning fyri báðar partar.

Sigast kann, at higartil hevur kjakið um hesar formligu spurningar skuggað fyri øllum øðrum, soleiðis at tað ongantíð hevur verið høvi

at skifta orð við danskar ríkismyndugleikar um innihaldið í eini møguligari nýskipan av málsøkinum "ráevnunum í undirgrundini".

Roknast má tískil við, at spurningurin um, hvussu ræðið á undirgrundini formliga verður at skipa ella býta, verður ein ógvuliga týðandi táttur í eini semju.

3.2.2. Yvirvaldsrættur ("højhedsret").

Sum tað skilst av frágreiðingini frá fyrru undirgrundarnevndini og av frágreiðingini frá hesi nevndini um ríkisrættarlig og stýrisskipanarlig sjónarmið, hevur hugtakið "højhedsret" havt eitt rættiliga stórt pláss í hugaheiminum hjá donsku stjórnini, tá ið talan hevur verið um ráevni í undirgrundini.

Her verður ikki endurtikið tað, sum áður er skrivað um hetta evnið. Sum víst er á, ber ein yvirtøka av málsøkinum "ráevni í undir grundini" í sær avluting av "højhedsret" frá ríkismyndugleikunum til landsmyndugleikarnar í hvørki størri ella minni mun enn ein yvirtøka av einum og hvørjum øðrum málsøki.

Yvirtøka ber í sær rættin til at lóggeva og rættin til at umsita; aðrir partar av yvirvaldsrættinum, sum t.d. dómsvaldið og viðurskifti við útheimin, verða verandi hjá ríkismyndugleikunum. Av tí at talan er um yvirtøku av B-máli, hevur danska stjórnin høvi at leggja treytir við, sum føroysku myndugleikarnir mugu binda seg til ikki at fara útum.

At danska stjórnin hevur yvirvaldsrætt ("suverænitet/højhedsret") yvir øllum tí danska ríkinum, haruppií Føroyum og føroysku undirgrundini, er eyðsæð. Tað er ein fylgja av fólkarættarligum grundreglum og donsku stjórnarskipanini og er staðfest í heimastýrislógini

og skuldi sostatt ikki verið neyðugt at endurtikið í eini rammulóg ella einum sáttmála um undirgrundina. Kortini kann hugsast, at danska stjórnin av politiskum grundum ynskir eina slíka endurtøku, sum føroyskir myndugleikar neyvan missa nakað við at góðtaka, alt eftir, hvussu hon er orðað.

3.2.3. Lóggávuvald.

Frá føroyskari síðu er tað ein fortreyt, at heimastýrið fær heimild at skipa fyri føroysku undirgrundini við løgtinglóg. Hvussu víðar heimildirnar skulu vera, mugu partarnir koma til sættis um.

Ein møguleiki er sum áður nevnt ein donsk rammulóg, ið ásetir karmarnar, sum løgtingið kann lóggeva innanfyri.

Ein kundi sjálvsagt eisini hugsað sær eina loysn, sum bygdi á eitt uppbýti av lóggávuvaldinum viðvíkjandi undirgrundini millum danska og føroyska lóggávuvaldið. Ein slík loysn hevði neyvan verið nýtilig í praksis og skal tí ikki verða gjørt meira burturúr henni her.

Danir hava latið rættiliga týðiliga komið fram, at teir hava ógvuliga ilt við at lata lóggávurættin í undirgrundarmálum frá sær. Ein kann tí rokna við, at um teir slaka á hesum øki, er tað við teirri treyt, at lóggávuvaldið hjá føroyingum á hesum øki verður neyvt avmarkað.

3.2.4. Fyrisitingarvald.

Fyrisitingina av málsøkinum "ráevni í undirgrundini" er helst lættari at fáa ríkismyndugleikarnar at avhenda føroysku myndugleikunum. Hetta hevði t.d. kunnað verið gjørt á líknandi hátt sum við eini sonevndari "§ 9

yvirtøku", um føroyskir myndugleikar halda slíka loysn vera nóg víðgongda. Her verður ikki roknað við, at ein yvirtøka bert av umsitingarvaldinum sambært § 9 er nóg mikið til at lúka føroyska kravið um yvirtøku av málsøkinum, (sbr. 3.2.3.).

Verður hugsað um eitt sundurbýti av umsitingarvaldinum millum danskar og føroyskar myndugleikar hevði hetta helst roynst ógvuliga ópraktiskt. Víst kann verða til, at í grønlendsku ráevnisskipanini verður alstórur dentur lagdur á bert at hava eina fyrisiting. Sum aðrastaðni umrøtt stendur grønlendska ráevnisfyrisitingin undir tí sonevnda felagsráðnum, men er kortini partur av fyrisitingarøkinum hjá danska orkumálaráðharranum.

Her verður ikki roknað við, at føroyskir myndugleikar ganga við til minni enn at fyrisitingin av málsøkinum fult út verður á føroyskum hondum.

3.2.5. Viðurskiftini við útheimin.

Tað er eyðsæð, at ein yvirtøka sambært heimastýrislógini má virða § 5 í hesi lóg, sum ljóðar soleiðis:

"De færøske myndigheders kompetence er undergivet den begrænsning, der følger af de til enhver tid bestående traktatmæssige og andre internationale rettigheder og forpligtelser.

Rigsmyndighederne har afgørelsen i spørgsmål, der angår rigets forhold til udlandet".

Sum áður nevnt hevur tað verið tilskilað við yvirtøku av einstøkum málum t.d. útvarpinum, at ríkismyndugleikarnir ikki vilja avhenda rættin til at taka sær av viðkomandi málsøki mótvegis útlandinum.

Óivað hevur málsøkið "ráevni í undirgrundini" týdning fyri viðurskiftini millum danska ríkið og útlandið.

Roknast kann tí við, at ríkismyndugleikarnir ynskja reglur, ið sláa hetta fast, og hesum kunnu føroyskir myndugleikar við heimastýrislógini sum grundarlag ikki seta seg ímóti.

Grein 5 í heimastýrislógini sipar sjálvsagt til viðurskiftini millum danska ríkið øðrumegin og onnur ríki hinumegin og ikki til viðurskiftini millum privatar útlendingar og Føroyar. T.d. kann verða nevnt, at málsøkið inn- og útflutningur, ið umfatar viðurskifti, ið sum oftast eru millum einstaklingar í Føroyum og útlandinum, er eitt føroyskt sermál.

Tað er tó ikki óhugsandi, at danskir myndugleikar fara at ynskja eina ella aðra trygd fyri, at Føroyar t.d. ikki taka upp samvinnu við statsfyritøkur í londum, ið Danmark ikki ynskir at hava samvinnu við um ráevni í undirgrundini.

Eitt annað mál,sum higartil hevur verið mett sum ríkismál, er spurningurin um loyvi hjá útlendingum at gera vísindaligar kanningar á land- ella serliga á sjóøkinum.

Mannagongdin hevur sum aðrastaðni nevnt higartil verið tann, at søkt hevur verið um slík loyvi ígjøgnum danska uttanríkismálaráðið, sum sendir málið til ummælis bæði hjá øðrum avvarðandi ríkismyndugleikum og hjá heimastýrismyndugleikunum og síðan gevur ella sýtir at geva umbidna loyvið.

Hugsast kann, at ríkismyndugleikarnir framvegis vilja varðveita henda myndugleika mótvegis útlendingum eisini um so verður, at málsøkið "ráevni í undirgrundini" verður yvirtikið sum føroyskt sermál.

## 3.3. Orkupolitikkur.

### 3.3.1. Inngangur.

Við tí týdningi, ið orka hevur fyri nútíðarsamfelagið er væl skiljandi, at landastjórnir royna at reka orkupolitikk.

Serliga hendingarnar í 1973-74, tá ið olja gjørdist trotvøra í stórum pørtum av heiminum og oljuprísirnir hækkaðu munandi, góvu landastjórnunum ein hvøkk, ið fekk tær at hugsa meira enn fyrr um at føra ein skynsaman orkupolitikk.

Í flestu londum um okkara leiðir miðar orkupolitikkurin móti at skapa størst møguliga trygd fyri einum stórum og jøvnum framboði av orku.

Kolvetni er ójavnt býtt landanna millum, og nógv lond hava bert innflutning av olju og gassi á at líta sum orkugrundarlag.

Londini hava tí roynt at skapa størst møguliga trygd, partvíst við at royna at fjøltátta orkunýtsluna, soleiðis at ikki verður litið ov nógv á einstakar orkukeldur t.d. innflutta olju ella innflutt gass, og partvíst við at royna at útvega aðrar orkukeldur t.d. kjarnorku.

Í danska orkupolitikkinum hevur høvuðsdenturin verið lagdur á at minka um ta ótrygd, sum stóðst av, at Danmark var ógvuliga heft av innfluttari olju. Samstundis hevur tað verið danskur orkupolitikkur ikki at framleiða kjarnorku.

Heldur hevur verið roynt at fjøltátta orkunýtsluna, t.d. við at gera elverkini før fyri at nýta bæði olju, gass og kol, og samstundis framleiða fjarhita, við at fremja menn-

ing og nýtslu av varandi orkukeldum sum t.d. sól og vindi og við at skunda undir útvinning av kolvetni úr donsku undirgrundini.

Hetta seinasta endamálið skínur týðiliga ígjøgnum grundgevingarnar fyri donsku undirgrundarlógini frá 1981.

Í hesi lóg vórðu treytirnar fyri leitingar- og útvinningarloyvum munandi herdar, fyrst og fremst fyri at skunda undir leiting eftir og útvinning av kolvetni. Eisini hava danskir myndugleikar gjørt stórar íløgur í olju- og gassleiðingar fyri at fáa oljuna og gassið ført í land í Danmark, og at fáa gassið nýtt til upphitingar og ídnað.

Í Føroyum hava myndugleikarnir eisini verið varugir við vansarnar av at vera ov mikið heftir at innfluttum orkukeldum. Við hesi grundgeving hava m.a. annað verið gjørdar stórar íløgur í vatnorkuverk til tess at tryggja eina innlendska elframleiðslu, ið er óheft av innfluttum kolvetni.

3.3.2. Orkupolitiskar metingar um nýtslu av føroysku undirgrundini.

Sæð frá føroyskum sjónarmiði er útvinning av kolvetni úr føroysku undirgrundini sjálvsagt ein av fleiri møguleikum til tess at tryggja tilflutning av orku til føroyska samfelagið. Aðrir møguleikar eru t.d. at útbyggja varandi orkukeldur sum vatn, sjóvarfall, vind- og aldumegi.

Føroyska samfelagnum fer kortini framvegis at tørva innfluttar kolvetnisúrdráttir sum bensin, dieselolju og gassolju.

Trygd fyri støðugum tilflutningi av slíkum kolvetnisúrdráttum kann t.d. fáast frá donsku stjórnini, oljufeløgum ella fremmandum landa-

stjórnum sambært serligum avtalum, har nakað verður latið fyri nakað.

Mált við altjóða alin er føroyski tørvurin ógvuliga lítil, og verður tað tí neyvan nakar stórvegis trupulleiki, t.d. í avtalum við altjóða oljufeløg um rættindi til útvinning av kolvetni úr føroysku undirgrundini, at tryggja Føroyum tær nøgdir, ið tørvur er á.

Fyri Danmark er tað eitt ógvuliga týðandi orkupolitiskt mál at gerast so sjálvbjargið við olju og gassi sum gjørligt.

Sæð frá ríkismyndugleikanna síðu er tað náttúrligt at meta tað sum eina skyldu hjá Føroyum sum partur av ríkisfelagsskapinum eftir førimuni at vera við til at tryggja orkutilflutningin til ríkið sum heild. Vit kunnu tískil rokna við, at danska stjórnin í samráðingum um eina undirgrundarskipan fer at royna at tryggja, at kolvetni í føroysku undirgrundini í mest møguligan mun verða nýtt til at nøkta danska tørvin á olju og gassi.

Ein aðaltreyt frá danskari síðu fyri føroyskari yvirtøku av undirgrundini verður tí helst, at tryggjaður verður donskum ríkismyndugleikum, ella oljufeløgum undir teirra ræði, forkeypsrættur til ein munandi part av framleiðsluni av olju og gassi úr føroysku undirgrundini.

Hvussu umráðandi hetta er fyri Danmark veldst um, hvussu góðar møguleikar hinir ríkispartarnir til eina og hvørja tíð hava fyri at nøkta danska tørvin. Um Danmark verður sjálvhjálpið við kolvetni frá donsku, og møguliga eisini grønlendsku, undirgrundini er hugsandi, at danir fara at leggja minni í hesar treytirnar Føroyum viðvíkjandi.

Júst spurningurin um sjálvbjargni við olju kann skapa álvarsliga ósemju millum Danmark og

lFøroyar um nýtslu av undirgrundini. Hetta er t.d. hugsandi í eini støðu, har kolvetni verður funnið í føroysku undirgrundini í slíkum nøgdum, at tað fíggarliga er ráðiligt at nýta tær, Danmark metir seg at hava stóran tørv á olju og gassi, men Føroyar hava ikki áhuga í útvinning.

Vísandi til ríkisfelagsskapin kunnu danskir myndugleikar tá seta krøv fram um, at farið verður í holt við útvinning í Føroyum. Tað verður torført hjá føroyingum at seta seg ímóti hesum, um ikki ógvuliga sterkar grundir tala ímóti útvinning.

Víst kann verða til "The Atlantic Accord", avtaluna millum kanadisku ríkisstjórnina og stjórnina í Nýfundlandi, sum umrødd er í frágreiðingini um altjóðarætt. Har verður avrátt, at um so er, at Kanada sum heild ikki er sjálvbjargið við olju og gassi, er tað kanadiska ríkisstjórnin, sum hevur seinasta orðið um loyvi til útvinning á landgrunninum útfyri Nýfundlandi, men í tíðarskeiðum, har Kanada er sjálvbjargið við olju og gassi, hevur nýfundlendska stjórnin avgerandi orðið.

Í grønlendsku ráevnisskipanini stendur, at báðir partar hava sýtingarrætt.

Í seinasta umfari er hetta ein spurningur um tær politisku metingarnar, ið partarnir hava um, hvørji rættindi og hvørjar skyldur teir hava innan ríkisfelagsskapin.

Samanumtikið kann verða sagt, at orkupolitiski áhugin hjá donsku stjórnini kann snúgva seg um bæði at fáa útvinning setta í gongd í Føroyum og um, at Danmørkini verður tryggjað rætt til ein munandi part av tí olju og gassi, sum útvunnið verður úr føroysku undirgrundini.

## 3.4. Samfelagsbúskapur.

Útvinning av kolvetni úr føroysku undirgrundini kann hava týdning bæði fyri føroyska samfelagsbúskapin og fyri samfelagsbúskapin hjá ríkinum sum heild.

Føroyski samfelagsbúskapurin er í løtuni bygdur á fiskiveiði og fiskatilvirking og á tær sekunderu og tertieru vinnur, ið knýttar eru at hesum høvuðsvinnum. Eisini fáa Føroyar eitt munandi ískoyti til samfelagshúsarhaldið frá danska ríkinum.

Føroyski búskapurin hevur seinnu árini verið merktur av ójavnvág, ið m.a. er komin til sjóndar við støðugum halli á gjaldsjavnanum úteftir og harvið vaksandi uttanlandsskuld. Íløguhugurin hevur verið serstaka stórur; uppsparingin hevur ikki heilt kunnað fylgt við.

Útvinning av kolvetni úr føroysku undirgrundini kann hjálpa føroyskum búskapi burtur úr nøkrum av verandi trupulleikunum t.d. gjaldsjavnahallinum og uttanlandsskuldini og føra til økta inntøku, uppsparing og nýtslu.

Útvinningarvirksemið kann tó eisini hava búskaparligar vansar við sær m.a. við at trýsta lønar- og kostnaðarlagið uppeftir, so at aðrar vinnur fáa verri við at kappast við útlandið. Ansar eitt samfelag ikki eftir, kann tað lættliga koma í ta støðu, at tá ið oljan og gassið eru um at vera uppi, er grundarlagið eisini máað undan øllum øðrum vinnum. Tá kann gerast trupult at rætta búskapin uppaftur.

Tað, sum ger tað so torført at meta um, hvat gagn føroyski búskapurin kann fáa burturúr útvinning av kolvetni, er, at føroyska samfelagið er so lítið og fáment.

Útvinningavirksemið kann lættliga gerast so stórt, at tað køvir alt annað virksemi, og inntøkurnar frá tí verða so stórar, at tær

eisini fáa sterka avlagandi ávirkan á búskapin og samfelagið sum heild.

Sum heild kann tí sigast, at tað, sum føroyski búskapurin hevur størstan tørv á, er eitt ískoyti, sum ikki er ov stórt, men sum kann virka stabiliserandi á búskaparligu gongdina, t.d. soleiðis at árligu broytingarnar í fiskiveiði og fiskaprísum merkjast minni enn nú.

Føroyar hava nógv størri nyttu av einari støðugari, javnari, ikki ov stórari árligari inntøku enn av einum evarska lítlum møguleika fyri eini ógvuliga stórari innløgu, sum kanska kemur um nøkur ár og kanska ongantíð.

Fyri danska búskapin kann útvinning av kolvetni í føroysku undirgrundini gera gagn, um tær funnu nøgdirnar eru nóg stórar. Við at minka um innflutningstørvin ella við útflutningi av kolvetni kann gjaldoyra fáast til tann felags gjaldoyrakassan hjá Kongaríkinum Danmark. Harvið kann minkast um danska gjaldjavnahallið og donsku uttanlandsskuldina og virðið á donsku krónuni verður fastari.

Donsk luttøka í útvinningarvirksemi undir Føroyum kann geva lønandi útflutningsinntøkur og virkisinntøkur, sum kunnu gagna danska búskapinum sum heild og økja um donsku bruttotjóðarúrtøkuna.

Samanumtikið kann sigast, at fyri Føroyar kann møguliga inntøkan frá kolvetni úr føroysku undirgrundini fáa ein mestsum ov stóran týdning. Fyri tað meira enn hundrað ferðir so stóra danska samfelagið fær kolvetnisútvinning í Føroyum bert stórvegis týdning, um virksemið verður heilt stórt.

Tað, sum føroyski búskapurin hevur mestan tørv á, er ein lutfalsliga lítil, men álítandi og jøvn inntøka yvir longri tíð. Tað, sum danski búskapurin kann fáa nyttu burturúr, er

ein munandi størri inntøka yvir styttri ella longri tíð. Hvussu álítandi oljuinntøkurnar verða, hevur minni týdning fyri tað danska samfelagið enn fyri tað føroyska.

Niðanfyri verður viðgjørt nærri, hvussu búskaparlig føroysk og donsk áhugamál kunnu ávirka eina møguliga undirgrundaravtalu.

3.5. Fíggjarviðurskifti.

3.5.1. Inngangur.

Í teimum londum, sum hava munandi útvinning av kolvetni úr undirgrundini, hevur henda útvinning stóran fíggjarligan týdning fyri tað almenna.

Við ráevnisvirksemi fylgja bæði almennar útreiðslur og møguligar almennar inntøkur.

Hvat útreiðslum viðvíkir er vert at minna á heimastýrislógina, sum sigur, at tá ið eitt mál verður yvirtikið sum sermál, yvirtaka føroyskir myndugleikar eisini tær útreiðslur, ið av málinum standast.

Útgangsstøðið má tí vera, at við eini yvirtøku av málsøkinum "ráevni í undirgrundini" fylgja eisini tær útreiðslur, ið standast av fyrisiting av hesum málsøki, eins væl og aðrar útreiðslur t.d. til rannsóknir og kanningar av undirgrundini.

Vanligt er, at almennar útreiðslur, ið standast av fyrisiting av útvinningarvirksemi, sum er í gongd, verða heilt ella partvíst endurrindaðar av vinnuni sjálvari. Viðhvørt ber til at fáa fyritøkur, ið hava áhuga í útvinning, at átaka sær vísindaligar rannsóknar- og leitingarútreiðslur, ímóti at hesar útreiðslur seinni verða mótroknaðar í møguligum avgjøldum.

Av tí at tað í samráðingum um eina undirgrundaravtalu kann hugsast, at danska stjórnin setir ynski fram um at fáa part í avgjaldsinntøkum frá útvinning úr undirgrundini er tað ikki óhugsandi, at landsstýrið afturfyri fer at krevja, at danskir myndugleikar eru við til at bera nakrar av teimum neyðugu rakstrar- og kanningarútreiðslum, ið skulu til áðrenn møguligar inntøkur koma til sjóndar.

3.5.2. Útreiðslur av málsøkinum "ráevni í undirgrundini".

Málsøkið "ráevni í undirgrundini" er eitt sera umfatandi málsøki. Undirgrundin undir føroyska landøkinum er sum kunnugt lítil, men undirgrundin undir føroyska landgrunninum er ógvuliga stór. Hon er við um at fara, og er enn lítið kannað.

Kanning, leiting og útvinning av ráevnum úr undirgrundini eru kostnaðarmikil og krevja fløktar sáttmálar við stór, peningasterk útlendsk feløg.

Útreiðslurnar til fyrisiting av málsøkinum verða tí eftir føroyskum máti stórar. Kanningar av undirgrundini við tí í hyggju at útvega føroyskum myndugleikum eitt gott grundarlag undir útvinningarpolitiskum avgerðum, verða eisini sera kostnaðarmiklar.

Ein yvirtøka av undirgrundini merkir tí í fyrstu syftu øktar útreiðslur til fyrisiting og til kanningarvirksemi.

Til samanberingar kann verða nevnt, at grønlendska ráevnisfyrisitingin ("råstofforvaltningen") í 1987 hevði útreiðslur uppá 21 mió. kr. Av hesum vórðu 11 mió. kr. mótsvaraðar av inntøkum. Nettoútreiðslan til sjálva fyrisitingina var slakar 10 mió. kr., svarandi til

umleið 27 ársverk.

Útreiðslurnar hjá Grønlands Geologiske Undersøgelser vóru slakar 34 mió. kr. Av hesum varð ein hálv millión mótsvarað av inntøkum. Har vórðu 109 ársverk nýtt.

Umhvørvisdeildin hjá "Grønlands fiskeri- og miljøundersøgelser" hevði rakstrarútreiðslur uppá slakar 5 mió. kr. svarandi til 8 ársverk.

Samlaðu bruttoútreiðslurnar vóru 59 mió. kr., nettoútreiðslurnar 47 mió. kr. og ársverkini 144.

Hetta er støddin á grønlendsku ráevnisfyrisitingini og jarðfrøðiliga og umhvørvisliga kanningarvirkseminum í einum ári, har virksemið ikki var serliga stórt.

Kemur leitingar- og útvinningarvirksemið í gongd av álvara, rokna teir við stórari øking í fyrisitingarútreiðslunum, men rokna við, at ein munandi partur av hesum meirútreiðslum verður mótsvaraður av inntøkum frá útvinningarfeløgunum.

Føroyska undirgrundin er sjálvsagt ikki nær so stór sum tann grønlendska, men taka vit allan tann landgrunnin við, sum Føroyar kanna sær, er hon ikki heilt lítil heldur.

Brúk verður tí undir øllum umstøðum fyri eini munagóðari fyrisiting til at fyrireika skynsamar politiskar avgerðir um undirgrundina, til at fáa ein karm av lógum og kunngerðum til vega og at samráðast um tær ofta ógvuliga fløktu rannsóknar-, leitingar- og útvinningaravtalur, ið gerast skulu. Eisini skal samráðast við ríkismyndugleikarnar um felags ella mótstríðandi áhugamál. Umframt hetta verður eisini brúk fyri umsiting til at taka sær av øðrum føroyskum áhugamálum, ið nevnd verða seinni í hesi frágreiðing.

Tá ið talan er um kanningarútreiðslur, er

áður nortið við jarðfrøðiligu kanningarnar, sum gjørdar eru gjøgnum tíðirnar av Danmarks Geologiske Undersøgelse í samarbeiði við Føroya Jarðfrøðisavn.

Sambært uppskoti landsstýrisins til fíggjarløgtigslóg fyri 1988 var játtanin til jarðfrøðisavnið ein sløk hálv millión kr.

Samlaði kostnaðurin av teimum borikanningum v.m., sum gjørdar vóru í Vestmanna og Lopra, var 13 mió. kr.

Í 1987 góðkendu danskir játtandi myndugleikar eitt uppskot frá danska orkumálaráðnum til vísindaligar kanningar av jarðbotninum rundan um Føroyar. Samlaða ætlanin varð mett til 248 mió. kr.

Tann játtanin, sum í fyrsta umfari varð søkt um, var 18 mió. kr. Harumframt varð roknað við, at landsstýrið skuldi lata 1-2 mió. kr. til hesar kanningar. Nevnt var, at landsstýrið hevði víst á, at tað (burtursæð frá 1 mió. kr. frá Carlsbergfondet) hevði goldið 12 mió. kr. í sambandi við borikanningarnar.

Verkætlanin, sum mett varð til 248 mió. kr. í 1987, varð roknað at ganga frá 1987 til 1991. Endamálið við hesi kanningarætlan er at fáa til vega jarðfrøðiliga og geofysiska grundvitan um havbotnsviðurskiftini rundan um Føroyar og serliga í útsynning úr Føroyum og til at gera vart við mótvegis øðrum londum, at hetta er havbotnur, sum Danmark (vegna Føroyar) kannar sær. Skulu aðrar kanningar gerast við tí fyri eyga at meta um kolvetnismøguleikarnar, verður brúk fyri nógv størri upphæddum.

### 3.5.3. Býti av útreiðslunum við aðrar.

Tað er neyðugt hjá føroyskum myndugleikum at gera sær greitt, í hvønn mun teir sjálvir

ætla sær at fíggja eitt so umfatandi kanningarvirksemi. Ætla teir sær ikki sjálvir at fíggja tað fult út, mugu teir gera sær greitt, undir hvørjum treytum aðrir, t.d. danskir myndugleikar, kunnu hugsast hava áhuga fyri at vera við til slíka fígging.

Í tann mun føroyskir myndugleikar ikki vilja ofra kostnaðin av at útbyggja fyrisiting og kanningarvirksemi fult út, men vilja gera brúk av fyrisitingarorku og kanningarorku frá øðrum, er eisini neyðugt at gera sær greitt, í hvønn mun hetta verður at gjalda beinleiðis og í hvønn mun hetta verður at gjalda óbeinleiðis við at geva øðrum, antin donskum myndugleikum ella fremmandum oljufeløgum, aðrar sømdir afturfyri.

Niðanfyri verða umrødd møgulig donsk ynski um at fáa burturav føroyskum avgjalds- og skattainntøkum av ráevnisvirksemi og onnur forrættindi í sambandi við slíkt virksemi. Afturfyri slíkar sømdir kunnu føroyingar m.a. peika á møguleikan fyri, at danskir myndugleikar verða við til at bera bæði fyrisitingarútreiðslur og kanningarútreiðslur, møguliga soleiðis at teir fáa peningin aftur um so er, at leitingarvirksemið gevur munagóð fíggjarlig úrslit.

Ein møguleiki hevði t.d. verið, um føroyskir og danskir myndugleikar avtalaðu, at vísindaligar kanningar heilt ella lutvíst vórðu fíggjaðar úr einum donskum/føroyskum grunni, sum varð fíggjaður úr landskassanum og ríkiskassanum eftir áhuga og førimuni, og at møguligar inntøkur av útvinningarvirksemi í fyrsta umfari vórðu nýttar til at fylla uppí aftur grunnin, soleiðis at hann fekk endurrindað landskassanum og ríkiskassanum teirra útreiðslur, møguliga við rentum.

3.5.4. Inntøkur landskassans.

3.5.4.1. Inngangur.

Omanfyri eru landskassaútreiðslur og møgulig endurrindan frá øðrum síðum av slíkum útreiðslum umrøddar. Her skal verða røtt um teir inntøkumøguleikar, sum føroyskir myndugleikar kunnu fáa burtur úr útvinningarvirksemi bæði sum loyvisgevarar og sum skattavald.

3.5.4.2. Avgjøld.

Virksemið byrjar vanliga við forkanningum, heldur síðan fram við leiting og endar við útvinning. Sjálvandi er møguligt at krevja avgjøld á øllum hesum trimum stigum. Møguleikarnir fyri avgjøldum av innleiðandi kanningarvirksemi eru tó ikki stórir.

Ávís feløg kunnu hugsast at vilja gera kanningar fyri egna rokning við tí í hyggju at selja áhugaðum oljufeløgum royndarúrslitini. Ein vanlig treyt fyri loyvi til hetta er, at myndugleikarnir fáa høvi til at fylgja við í kanningunum og fáa øll kanningarúrslit. Stundum tryggja myndugleikarnir sær einkarrætt til úrslitini eitt ávíst áramál.

Eisini er møguligt, at myndugleikarnir sjálvir fyri egna rokning lata kanningarnar gera og selja oljufeløgunum úrslitini. Henda mannagongd setir sjálvsagt størstu krøvini til almennar útreiðslur, men gevur hinvegin størstu trygdina fyri stýring av gongdini.

Fyri leiting er møguligt at fáa ávís avgjøld t.d. sonevnd "arealavgjøld", sum eru føst árlig gjøld í tí tíðarskeiðinum, leitingarvirk-

semið verður loyvt. Spurningurin er kortini, hvussu stórir møguleikarnir eru fyri at fáa munagóðar inntøkur fyri leitingarloyvi út um tað, ið uppkravt verður til tess at gjalda tær eftirlits- og umsitingarútreiðslur, ið eru neyðugar orsakað av sjálvum leitingarvirkseminum. Sum dømi kann verða nevnt, at í tí loyvinum, sum oljufelagið ARCO hevur fingið í Jameson Land í Eysturgrønlandi, er árliga avgjaldið í leitingartíðarskeiðinum 8 mió. kr.

Tá ið talan er um útvinningarvirksemi kunnu nógvar ymiskar samansetingar av avgjøldum hugsast, alt eftir hvussu áhugamálini hjá landsins myndugleikum øðrumegin og hjá oljufeløgunum hinumegin eru. Verður ein lutfalsliga stórur partur av avgjøldunum kravdur ár um ár frá byrjan við fastari upphædd, verður ein afturfyri noyddur at seta linari avgjaldskrøv seinri.

Tá ið útvinning er komin í gongd ber til at krevja t.d. fast gjald fyri tonsið av útvunnari olju (ella tilsvarandi nøgd av gassi). Til ber eisini at kanna sær ávísan prosentpart av tí olju/gassi, sum upp kemur. Hesar inntøkur verða sostatt at vaksa ella minka í samsvari við framleiðsluna.

Eisini er møguligt at áleggja avgjøld, sum verða roknað sum partur av vinninginum, sum feløgini hava av ráevnisvirkseminum. Hetta merkir, at feløgini fyrst skulu hava møguleikar at draga sínar - ofta stóru - íløguútreiðslur og rakstrarútreiðslur frá, áðrenn vinningurin verður roknaður. Tá kunnu ganga nógv ár, áðrenn slík avgjøld koma til sjóndar í landskassans roknskapi.

3.5.4.3. Beinleiðis og óbeinleiðis skattir.

Sum skattavald kann landsstýrið uppkrevja vanligan inntøkuskatt og partafelagsskatt av teimum, sum reka útvinningarvirksemi. Eisini her fer ofta at ganga drúgv tíð, til skattbærur vinningur kann verða staðfestur.

Landskassin kann eisini fáa inntøkur í gjøgnum vanlig avgjøld t.d. innflutningsgjald av útgerð til útvinningarvirksemið. Serligt framleiðslugjald kann verða lagt á útvunnin ráevni og útflutningsgjald á útflutningin av teimum. Slík avgjøld hava tann fyrimun fyri landskassan, at tey koma rættiliga skjótt til høldar, men hava samsvarandi vansar fyri oljufeløgini við at økja um íløgu- og rakstrarbyrðina hjá teimum langt áðrenn nakar vinningur er í ljósmála.

Lønarinntøkur av útvinningarvirksemi og tann vinningur, ið fyritøkur kunnu fáa av at selja vørur og tænastur til útvinningarvirksemið, eru við til at breiðka skattagrundarlagið hjá landskassanum.

Um so er, at føroysk privatfeløg fara upp í oljuvinnuna, verða eisini tey við til at breiðka um skattagrundarlag landskassans.

3.5.4.4. Tað almenna við í útvinning.

Ein annar háttur at fáa almennar inntøkur úr útvinning er, at myndugleikarnir sjálvir fara uppí útvinningarvirksemið, antin beinleiðis ella ígjøgnum partafeløg, ið stovnað verða til endamálið.

Loyvi til útvinning av kolvetni verða ofta givin fleiri fyritøkum, ið arbeiða saman sum eitt sonevnt "konsortium". Myndugleikarnir kunnu tryggja sær, at teir sjálvir ella partafelag teirra eru við í hesum konsortium við

einum ávísum prosentparti, men soleiðis at hinir partaeigararnir í fyrsta umfari gjalda landsins ella landsfelagsins part av samlaðu útreiðslunum. Sagt verður tá, at landið ella landsfelagið verður "borið" ígjøgnum íløgutíðarskeiðið. Tess partur av íløgukostnaðinum verður so mótroknaður í tí vinningi, sum landið ella landsfelagið eigur, tá ið fyritøkan fer at geva avlop.

3.5.4.5. Ríkisins áhugi í inntøkunum.

Sum tað skilst á dønum, halda teir tað vera órímiligt, at føroyingar ikki vilja lata ríkiskassanum burturav eini ráevnisinntøku úr føroysku undirgrundini, eftir í so nógv ár at hava fingið stórar upphæddir úr ríkiskassanum.

Sum umrøtt aðrastaðni hava ríkismyndugleikarnir ikki skattleggingarmyndugleika í Føroyum.

Við eini yvirtøku av fyrisitingini av undirgrundini verða tað landsmyndugleikarnir, sum geva loyvini til leiting, útvinning o.s.fr., og sum tí eisini taka ímóti loyvisavgjøldum.

Inntøkurnar, ið nevndar vórðu omanfyri sum t.d. "arealgjøld", avgjøld fyri leiting o.s.fr., eru helst so smáar, at tær ikki gera mun fyri ríkiskassan, og eru tí neyvan av serligum áhuga fyri ríkismyndugleikarnar.

Í tann mun danskir persónar og donsk feløg taka lut í útvinningarvirksemi í Føroyum, hava danskir myndugleikar sjálvsagt áhuga í, at hesir persónar og hesar fyritøkur í mest møguligan mun rinda skatt í Danmark. Hesin spurningur verður vanliga reguleraður við tvískattaavtalum.

Áður er umrøtt, at hava danskir myndugleikar útreiðslur av føroysku undirgrundini

kundu teir á ymsan hátt fingið slíkar útreiðslur endurgoldnar, um lønandi virksemi kom í lag.

Danskir myndugleikar eru uttan iva áhugaðir í, at danska ríkið, donsk ríkisfeløg ella eitt føroyskt/danskt oljufelag sleppa upp í í útvinningarvirksemið. Hetta kundi dugnað danska ríkiskassanum.

Danski ríkiskassin kundi fingið gagn av møguligum føroyskum landskassainntøkum av ráevnisútvinning úr føroysku undirgrundini um hetta førdi við sær, at føroyska heimastýrið átók sær nakrar av útreiðslunum, sum danski ríkiskassin higartil hevur goldið.

Her kann verða víst á, at sambært heimastýrislógini kann ríkisstjórnin eins væl og landsstýrið krevja, at øll A-mál verða yvirtikin sum sermál, og at landskassin sostatt stendur einsamallur við útreiðslunum av hesum málum. Somuleiðis kann ríkisstjórnin biðja um samráðingar við landsstýrið um yvirtøku av teimum B-málum, ið eftir eru.

Við hesum í huga hevði tað óivað verið ein sjálvsagdur táttur í eini semju millum Danmark og Føroyar um undirgrundina, at føroyskir myndugleikar bjóðaðu seg til at yvirtaka, ið hvussu so er A-málini, og møguliga eisini B-málini, í tann mun ráevnisvirksemið skapti fíggjarligar møguleikar fyri slíkum yvirtøkum, heldur enn at bíða eftir, at danska stjórnin kravdi slíkar yvirtøkur.

Tá ið tann búskaparliga síðan av málinum varð umrødd, varð víst á, at tað pinkulítla føroyska samfelagið hevur størri áhuga í eini javnari og álítandi lítlari inntøku, enn í eini ógvuliga stórari, men tilsvarandi ivasamari inntøku av undirgrundini.

Út frá hesum sjónarmiði kundi ein eisini

hugsað sær, at avtalað varð partanna millum, at um inntøkurnar av avgjøldum, skatti o.s.fr. av útvinningarvirkseminum fóru upp um eina ávísa upphædd fyri hvønn íbúgva í Føroyum, fóru føroyskir myndugleikar at bjóða sær til at rinda ein part av teimum inntøkum, ið fóru upp um hesa inntøku fyri hvønn íbúgva, inn í danska ríkiskassan, annaðhvørt sum eitt alment tilskot til ríkisins inntøkugrundarlag ella í ávísar grunnar við ávísum endamálum.

Partarnir kunnu samráðast um, nær ið slík eykainngjøld til ríkiskassan kunnu koma upp á tal, og til hvørji endamál, tey skulu nýtast.

## 3.6. Vinnumøguleikar.

### 3.6.1. Inngangur.

Olju- og gassútvinning gevur vinnumøguleikar bæði beinleiðis og óbeinleiðis.

Í sjálvum útvinningarvirkseminum eru tað oljufeløgini, sum gera tær stóru íløgurnar í teirri vón at fáa stóran vinning burturúr tá ið avtornar.

Olju- og gassútvinningarvirksemi er hátøknifrøðiligt og kapitalkrevjandi, men nýtist ikki nógva arbeiðsmegi. Tær stóru upphæddirnar eru sostatt at vinna hjá teimum, ið seta pening í vinnuna.

Starvsmøguleikarnir eru sum nevnt í mun til framleiðsuvirðið rættiliga smáir, men talan er um bæði væl lønt serfrøðingastørv og um størv til minni útlærda arbeiðsmegi, sum kortini eisini fær góða løn vegna tær óvanligu arbeiðsumstøðurnar.

Umframt beinleiðis útvinningarvirksemi gevur oljuvinnan í øðrum umfari stórar møguleikar fyri óbeinleiðis virksemi hjá teimum,

sum selja útvinningarvirkjunum vørur og tænastur.

Tann inntøkuøking í samfelagnum, sum bæði oljuvirksemið sjálvt og tað óbeinleiðis virksemið, ið nevnt er, førir við sær, gevur í triðja umfari øktar vinnumøguleikar, ikki minst í tænastuvinnunum.

Tað lítla føroyska samfelagið ræður ikki yvir meiri enn einum evarska lítlum parti av tí peningi, ið skal til fyri at fíggja oljuvirksemið. Ein kann tí ikki rokna við stórvegis beinleiðis føroyskari luttøku í sjálvum oljuútvinningarvirkseminum.

Áhugin fyri teimum - oftast vælløntu - størvunum í útvinningarvirkseminum er sjálvsagt nakað størri, men her er talan um serfrøðingar, sum tað tekur langa tíð at útbúgva, og um størv fyri fólk, ið kanska ikki hava eina fakliga útbúgving í vanligari merking, men sum kortini skulu hava royndir innan oljuvinnuna, sum føroyingar í dag ikki hava.

Kemur oljuvinnan í gongd, og fløðir peningur inn í føroyska samfelagið frá avgjøldum v.m., verður tað í sjálvum sær at skapa økt tænastuvirksemi, sum fer at krevja nógva arbeiðsmegi.

Føroyingar hava tí áhuga í nøkrum størvum innan oljuvinnuna, og nakað av virksemi innan tær vinnur, ið selja til oljuvinnuna, men føroyska samfelagið er so lítið og arbeiðsorkan í hesum samfelag er so lítil, at vit rættiliga skjótt náa markinum fyri, hvat føroyingar yvirhøvur kunnu lata av fólki til hesar vinnur.

Í Danmark er arbeiðsloysi. Danir hava síðan oljuvirksemið tók seg upp í Norðsjónum roynt at stovna og útbyggja privat og almenn oljufeløg og at byggja upp óbeinleiðis oljuvirksemi og at útbúgva fólk, ið kann arbeiða

innan oljuútvinningarvirksemi. Roknað verður tí við, at danskir myndugleikar hava heilt stóran áhuga fyri, at teimum verður tryggjaður lutur í oljuvirkseminum, bæði við at donsk oljufeløg sleppa upp í sjálvt útvinningarvirksemið, at danskar fyritøkur sleppa framat við vørum og tænastum til oljuvirksemið, og at danskir serfrøðingar og donsk arbeiðsmegi annars fáa høvi til at starvast í hesum vinnum.

Niðanfyri verður farið eitt sindur longur út í æsir við hesum spurningum.

3.6.2. Vinnumøguleikar í sjálvum útvinningarvirkseminum.

3.6.2.1. Fyritøkur.

Roknast kann við, at danska stjórnin ynskir, at statsliga danska oljufelagið DONG (Dansk Olie og Naturgas) kemur við í møgulig "konsortium", ið fáa loyvi til oljuútvinning í føroysku undirgrundini, og at donsk feløg, eitt nú "Dansk Operatørselskab I/S" (DANOP), har DONG eigur helvtina og privatar danskar fyritøkur eiga hina helvtina, sleppa framat sum operatørar.

Eisini er hugsandi, at danska stjórnin vil hava, at privatar danskar oljufyritøkur fáa part í leitingar- og útvinningarloyvum og part í sjálvum operatørvirkseminum.

Hetta eru viðurskifti, sum teir loyvisjáttandi myndugleikarnir hava beinleiðis ræði á. Vanligt er, at teir loyvisjáttandi myndugleikarnir eftir egnum tykki kunnu samanseta tey "konsortium", sum fáa leitingar- og útvinningarloyvi.

Sostatt kann verða roknað við, at donsku myndugleikarnir vilja hava, at bæði almennar og

privatar danskar fyritøkur fáa frammíhjárætt til leitingar- og útvinningarloyvi og til útvinningarvirksemi fram um aðrar útlendskar fyritøkur.

3.6.2.2. Arbeiðsmegi.

Føroysk ella donsk feløg, sum taka lut í sjálvum útvinningarvirkseminum, kunnu geva føroyskari og danskari arbeiðsmegi framíhjásømdir.

Tá ið loyvi verða givin útlendingum ber eisini til at seta sum treyt, at útlendsku feløgini í mest møguligan mun skulu taka føroyingar ella danir í starv, og læra ávikavist føroyingar og danir upp í teim uppgávum, ið krevja serligan kunnleika ella serligar royndir.

Sum áður nevnt hava Føroyar ein avmarkaðan áhuga í at fáa eitt ávíst tal av slíkum størvum. Tað er neyvan torført at sannføra danskar myndugleikar um, at útvinningarvirksemið fyrst og fremst skal koma føroyska samfelagnum til góðar, og at føroyingar tískil eiga at fáa fyrsta rætt til størv, men harútum ynskja danir óivað at tryggjað verður teimum forrættindi fram um borgarar úr øðrum londum.

3.6.3. Óbeinleiðis vinnumøguleikar.

Danska stjórnin kann óivað góðtaka, at føroyskir myndugleikar fyrst tryggja sær tey rættiliga avmarkaðu áhugamál, ið føroyingar hava fyri at sleppa at selja vørur og tænastur til útvinningarvirksemið.

Vísandi til ríkisfelagsskapin og teir virkismøguleikar, ið føroyingar annars hava havt og hava í danska ríkinum (burtursæð frá fiskiveiðimøguleikum), roknar danska stjórnin

óivað við at kunna fáa tryggjaðan forrætt fyri danskar fyritøkur at selja vørur og tænastur til útvinningarvirksemið, tá ið tann ógvuliga avmarkaði føroyski tørvurin á hesum er nøktaður.

Danska stjórnin fer tí helst at biðja um, at danskar fyritøkur fáa tryggjaðan slíkan forrætt í tí avtalu, ið gjørd verður.

Aðrir óbeinleiðis vinnumøguleikar enn teir áðurnevndu kunnu eisini hugsast.

T.d. kann tað hugsast, at landsstýrið sum lið í eini avtalu við eitt útlendskt oljufelag, fær viðkomandi oljufelag at skráseta tangaskip í Føroyum og at manna tey við føroyingum í tann mun, føroysk manning er tøk.

Avtalan millum Føroyar og Danmark um undirgrundina eigur ikki at verða orðað soleiðis, at hon forðar føroyingum í at útvega sær slíkar fyrimunir.

Avtalur um serrættindi til útvinningarvirksemi fyri fyritøkur úr einstøkum londum eru neyvan heilt í tráð við nútíðar hugsanir um frían marknað v.m., men allir partar viðganga, at slíkar avtalur verða gjørdar allastaðni.

T.d. kann hugsast, at EF-myndugleikarnir settu seg ímóti, at fyrimunur varð givin dønum framum aðrar EF-borgarar. Tað er ið hvussu er neyðugt at vera varugur við hendan trupulleikan, tá ið avtalur og loyvistreytir verða orðaðar.

Hugsandi er, at landsstýrið kundi ynskt at knýtt treytir fyri oljuútvinningarloyvi til útlendsk statsfeløg saman við heilt øðrum fyrimunum fyri føroyska samfelagið.

Ein kundi t.d. hugsað sær, at føroyingar sum treyt fyri útvinningarloyvi til norsk ella kanadisk oljufeløg kravdu fiskiloyvi á fiskiøkinum hjá hesum londum.

Sum nevnt í øðrum sambandi er hugsandi, at danskir myndugleikar fara at krevja at fáa eftirlit við møguligum føroyskum avtalum við útlendsk statsfeløg. Hetta er kortini neyvan fyri at forða føroyingum í at útvega sær fiskirættindi ella aðrar vinnuligar fyrimunir burtur úr slíkum avtalum, men heldur fyri at forða fyri møguligum politiskum treytum frá viðkomandi londum. Avtalan um ráevnisskipanina eigur tí at verða orðað samsvarandi hesum.

3.6.4. Føroyskt/danskt oljufelag.

Omanfyri er umrøtt, at bæði føroysk og donsk oljufeløg, almenn eins væl og privat, kunnu hava áhuga fyri at fáa lut í útvinningarloyvum og útvinningarvirksemi.

Ein náttúrligur liður í eini dansk/føroyskari samvinnu um nýtslu av kolvetni í føroysku undirgrundini hevði verið at gingið saman í eitt alment føroyskt/danskt oljufelag.

Vísast kann í hesum sambandi á tað fordømi, sum NUNA-OIL A/S er í Grønlandi.

Frá føroyskari síðu kann tann meginreglan um helvtarbýti, sum er í grønlendsk/donsku undirgrundarskipanini ikki væntast at verða góðkend.

Tað verður helst ein føroysk treyt, at eitt føroyskt/danskt oljufelag, umframt at hava heimstað í Føroyum (eins og NUNA-OIL A/S hevur heimstað í Grønlandi) fær føroyskan meiriluta.

So kann verða mett um, annaðhvørt hetta skal merkja 51%, 60% ella 66,67%.

Eitt slíkt føroyskt/danskt felag verður ikki bert ein karmur um felagsluttøku í sjálvum útvinningarvirkseminum, men kann eisini síggjast sum eitt amboð til tess at veita partar av vinninginum inn í ávikavist føroyska landskass-

an og danska ríkiskassan.

Royndirnar higartil við NUNA-OIL benda á, at eitt slíkt felag kann vera eitt hent amboð til at tryggja alment innlit bæði frá føroyskari og danskari síðu í sjálvt útvinningarvirksemið.

NUNA-OIL A/S verður eisini nýtt til at standa fyri rannsóknarvirksemi fyri tað almenna.

Frá føroyskari síðu hevði helst verið ynskiligt, um slíkt felag varð stovnað. Hinvegin er greitt, at skal felagið gera nakrar skreytir, er brúk fyri stórum peningainnskoti.

NUNA-OIL A/S hevði tvær ferðir 25 mió. kr. í stovningarfæi og sum lið í semjuni frá apríl 1988 verða íalt 25 mió. kr. skotnar inn afturat (12,5 mió. kr. frá hvørjari síðu). Hesi innskot gera lítlan mun, um so er at felagið skal í holt við útvinningarvirksemi av álvara. Tó er at viðmerkja, at í útvinningarloyvum er tað ofta ein treyt, at luttøkan hjá tí almenna útvinningarfelagnum verður "borin" av hinum pørtunum í viðkomandi "konsortium" (sbr. 3.5.4.4.).

3.6.5. Samandráttur.

Bæði tá ið talan er um beinleiðis og óbeinleiðis vinnumøguleikar, er greitt, at føroyski tørvurin er lutfalsliga lítil samanborin við tann danska og at møguleikarnir hjá føroyingum at bjóða dønum sømdir á hesum øki eru tilsvarandi góðir.

Vit kunnu tískil rokna við, at tilboð til danir um fyrimunir á hesum øki verða ein týðandi táttur í eini møguligari semju um eina undirgrundarskipan.

## 3.7. Umhvørvi.

Umhvørvisáhugamálini í sambandi við útvinningarvirksemi úr føroysku undirgrundini eru fyrst og fremst føroysk áhugamál.

Í eini føroyskari avviging av teimum búskaparligu, fíggjarligu og vinnuligu fyrimununum av útvinning øðrumegin móti umhvørvisvansunum hinumegin, er eyðsæð, at atlitið til umhvørvið vigar tungt.

Ein sáttmáli við danskar myndugleikar um eina ráevnisskipan eigur at byggja á danska viðurkenning av, at avgerðin um góðkenning av útvinningarvirksemi, tá ið talan er um umhvørvisspurningar á landi og sjógvi, má vera tikin av føroyskum myndugleikum sambært føroyskum umhvørviskrøvum.

Tá ið talan er um avviging millum olju- og gassútvinning øðrumegin og t.d. fiskivinnu hinumegin, má avgerðin um, hvussu stórur dentur skal verða lagdur á hvørt av hesum báðum, vera ein føroysk avgerð.

Eisini er tað greitt, at reglur um endurgjald fyri skaða, sum t.d. fiskifør fáa av útvinningarvirksemi, skulu vera ein partur av útvinningartreytunum. Somuleiðis skulu útvinningartreytirnar umfata trygd fyri endurgjaldi fyri skaða á umhvørvið av oljulekum og tílíkum.

## 3.8. Árin á samfelagið.

Nakað av tí, sum ger tað mest umráðandi hjá føroyingum sjálvum at fáa mest møguligt ræði á útvinningarvirksemi úr undirgrundini er ynskið um at hava fult tamarhald á tí árini, ið slíkt virksemi kann hava á alt føroyska samfelagið sum tað er.

Virksemið kann gerast so umfatandi, at tað álvarsliga órógvar alt annað føroyskt vinnulív.

Virksemið kann lættliga gerast so stórt, at tað krevur innflyting av stórum tali av fólki, sum eru ókunnug við føroyska mentan, føroyskar siðir og føroyskt mál.

Tað er avgerandi neyðugt, at árinið av hesum ikki verður størri enn, hvat føroyskir myndugleikar meta føroyska samfelagið tolir.

Tað er ikki vist, at tað er neyðugt í eini avtalu við danskar myndugleikar at fáa teirra skrivligu viðurkenning av, at hesi føroysku krøv eru avgerandi fyri, um útvinning verður sett í gongd og hvussu. Bert mugu danskir myndugleikar skilja og viðurkenna, at metingar sum hesar eru avgerandi fyri føroysku støðutakanina, bæði til útvinningarvirksemið sum heild og til einstakar partar av tí.

## 4. Útinningarreglur.

### 4.1. Inngangur.

Sum áður nevnt verður her roknað við, at B-málið "ráevni í undirgrundini" verður yvirtikið av føroyska heimastýrinum sum sermál, tó undir teimum serligu treytum, sum ríkisstýrið vísandi til skyldurnar hjá Føroyum sum partur av ríkisfelagsskapinum leggur við, og sum semja fæst um í samráðingum partanna millum. Sum fyrr nevnt hava slíkar treytir higartil ikki havt stórvegis týdning fyri lóggávu og umsiting av øðrum yvirtiknum B-málum. Tá ið talan er um málsøkið "ráevni í undirgrundini" bendir alt á, at treytirnar, sum danir leggja við, verða rættiliga umfatandi og tí fara at hava munandi ávirkan á bæði lóggávu og umsiting av hesum málsøki eftir yvirtøkuna.

Neyðugt er at umhugsa, hvat henda yvirtøkan fer at krevja av tí "apparati", ið skal hava hetta málsøkið undir hond.

### 4.2. Útgangsstøðið: Málið er sermál.

Útgangsstøði okkara er sum nevnt, at málsøkið "ráevni í undirgrundini" verður yvirtikið sum sermál. Hetta merkir, at Føroya løgting lóggevur og Føroya landsstýri umsitur hetta málsøki.

Spurningurin er, hvussu tær treytir, ið ríkismyndugleikarnir leggja við, kunnu hugsast at avmarka lóggávuvaldið og umsitingarvaldið hjá heimastýrinum og hvørja ávirkan hetta fær á teir stovnar, sum skulu lóggeva fyri, umsita og hava eftirlit við tí, sum fyriferst á hesum málsøki.

4.3. Treytir ríkismyndugleikanna.

Ríkismyndugleikarnir fara í fyrsta umfari at krevja, at heimastýrið heldur seg innan fyri karmin, ið heimastýrislógin setur. Hesum er einki nýtt í. Harumframt fara ríkismyndugleikarnir at krevja, at landsstýrið heldur seg innan fyri tann serliga karm, sum verður ásettur í avtaluni millum ríkismyndugleikarnar og heimastýrið um yvirtøkuna av málsøkinum "ráevni í undirgrundini".

Tað, sum ríkismyndugleikarnir helst fara at ynskja er:

- at fáa innlit í - og møguliga ávirkan á - føroysku "policy-making-processina", lógargerðina og fyrisitingina av málsøkinum,

- at fáa høvi til at tala at, um teir halda, at treytirnar ikki verða hildnar,

- at fáa høvi til at steðga møguligum føroyskum avgerðum, sum verða hildnar at stríða ímóti treytunum,

- at eitt forum finst fyri samráðingum við tí í hyggju, at sleppa undan trætum. Og um hetta ikki eydnast, so eitt forum, ið er ført fyri at avgera ósemjur partanna millum.

4.4. Mannagongd.

Tá ið talan er um "policy" viðvíkjandi nýtslu av ráevnum í føroysku undirgrundini, er at vænta, at danskir myndugleikar kundu hugsað sær eina kontaktnevnd, har gjørligt var hjá politikarum og embætismonnum, ið hava ábyrgdina av "policy making" á ráevnisøkinum, at tala saman um, hvørjar ætlanir partarnir hava.

Sum fordømi kann verða víst til, at í semjuni millum danskar og grønlendskar myndugleikar frá apríl 1988 er avtalað, at fundir skulu verða hildnir millum danska orkumálaráðharran og grønlendska landsstýrið eftir tørvi. Eisini verður røtt um eina embætismannanevnd, ið kann fyrireika slíkar fundir og kann seta úrslitini av teimum í verk.

Tá ið talan er um lóggávu, er støðan sum kunnugt tann, at ríkisumboðsmaðurin hevur sæti á løgtingi og kann tala at, um hann heldur løgtingslógaruppskot ella uppskot til samtyktar stríða ímóti heimastýrislógini. Henda mannagongd kann møguliga eisini nýtast, tá talan er um møguligt ósamsvar við treytirnar fyri yvirtøku av einum B-máli sum sermál.

Í heimastýrislógini, § 6, er fyriskipað ein mannagongd at loysa trætumál um, hvussu heimildirnar hjá heimastýrinum skulu tulkast og kunnu danskir myndugleikar sambært hesi grein seta eina føroyska avgerð úr gildi fyribils, til málið er loyst.

Tá ið talan er um fyrisiting, má roknast við, at føroyingar seta á stovn eina ráevnisfyrisiting við ábyrgd mótvegis Føroya landsstýri. Týðandi avgerðir verða helst lagdar fyri landsstýrið og heilt stórar avgerðir eisini fyri løgtingið ella eina serstaka løgtingsnevnd.

Fyrisitingin skal fyrireika uppskot til løgtingslógir á málsøkinum. Eisini skal fyrisitingin skipa fyri framtøkum í vísindaligum kanningum, leiting og útvinning av ráevnum úr undirgrundini.

Ráevnisfyrisitingin skal eisini taka støðu til umsóknir um loyvi til vísindaligar kanningar, leiting og útvinning og til møguligar broytingar í givnum loyvum.

Bæði tá ið talan er um framtøk og um viðgerð av umsóknum um loyvi til vísindaligar kanningar, leiting og útvinning er hugsandi, at danskir myndugleikar ynskja vitan um og innlit í føroysku málsviðgerðina og í tær avgerðir, ið tiknar verða.

Sambært § 15 í heimastýrislógini hava ríkismyndugleikarnir krav um at fáa boð um landsstýrisins avgerðir. Danska ynskið um innlit kann tí í ávísan mun verða nøktað við at ríkisumboðið eftir vanligum siði fær at vita um tær avgerðir, landsstýrið hevur tikið.

Vilja danskir ráevnismyndugleikar fylgja betur við t.d. í sjálvari málsviðgerðini, ið liggur undan avgerðunum, er møguligt, at teir kunnu seta ein serligan ráevnisráðgeva á ríkisumboðnum, sum kann hava samband við føroysku ráevnisfyrisitingina.

Eisini er hugsandi, at føroyska ráevnisfyrisitingin hevur áhuga í at fáa vitan og royndir frá donsku ráevnisfyrisitingini og at tað tí er áhugi frá báðum síðum fyri at gera avtalu um umsitingarligt samarbeiði millum danskar og føroyskar stovnar, har báðir partar geva og fáa vitan um ætlanir, tiltøk og avgerðir hvør hjá øðrum. Slíkar samarbeiðsavtalur kunnu verða nágreiniliga orðaðar, eftir at semja er fingin um høvuðsspurningarnar.

Møguligar trætur um, hvussu samarbeiðsavtalan verður at tulka, og um ávísar føroyskar avgerðir eru í samsvari við avtaluna, kunnu møguliga verða vístar til eina serliga samráðingarnevnd við umboðum frá báðum pørtum. Kunnu partarnir ikki tala seg til sættis, kunnu reglur um gerðarrætt við óheftum ástøðumanni verða avtalaðar í sáttmálanum ímillum føroyskar og danskar myndugleikar um yvirtøkuna av málsøkinum "ráevni í undirgrundini".

5. Samandráttur.

Sum umstøðurnar eru í løtuni har langt er millum donsku stjórnina og føroysku myndugleikarnar í spurninginum um yvirtøku av málsøkinum "ráevni í undirgrundini" hevur nevndin ikki mett tíðina búna til at gera nakað uppskot til sáttmála millum Føroyar og Danmark um at yvirtaka málsøkið "ráevni í undirgrundini".

Nevndin hevur hildið tað verið beinari at royna at útgreina teir spurningar, ið haldast fara at vera avgerandi fyri partarnar í framhaldandi samráðingum.

So vítt møguligt hevur nevndin eisini roynt at vísa á, hvørji sjónarmið partarnir mugu haldast at hava til aðalspurningarnar í málinum.

Nevndin ásannar, at báðir partar hava lagt stóran dent á formligar spurningar, serliga viðvíkjandi hugtakinum "yvirvaldsrætti" og "yvirtøku".

Arbeiði nevndarinnar í hesum partinum av frágreiðingini er bygt á tað grundsjónarmið, at málsøkið "ráevni í undirgrundini" verður yvirtikið sum føroyskt sermál, og kemur hetta sjálvandi at vera avgerandi fyri, í hvørjum líki ein samarbeiðsavtala partanna millum verður gjørd.

Nevndin hevur mett, at eitt týðandi mál í framhaldandi samráðingunum kann koma at vera, øðrumegin donsk ynski um at skapa framtíðartrygd fyri oljuveitingum til ríkið sum heild, og hinumegin føroyska grundvallarkravið um, at einhvør møgulig framtíðarútvinning av ráevnum úr føroysku undirgrundini verður at leggja soleiðis til rættis, at hon ikki verður føroyskum havumhvørvi og harvið framtíðar føroyskari fiskivinnu at meini.

Ein annar høvuðsspurningur verður helst, hvussu inntøkurnar, og harvið eisini útreiðslurnar, av møguligum útvinningarvirksemi skulu býtast.

Tá fortreytin sum nevnt er, at málið verður yvirtikið, er tað sjálvsagt, at avgjøld eins og skattir fella føroyskum myndugleikum til, og at heimastýrið átekur sær útreiðslurnar av umsiting av málsøkinum og av vísindaligum kanningum. Tá danskir myndugleikar hinvegin helst fara at krevja ein part av møguligum inntøkum, verður neyðugt í eini samarbeiðsavtalu at taka støðu til, hvussu hetta kann skipast og í hvønn mun teir eisini skulu taka lut í útreiðslunum.

Eisini hevur spurningurin um aðrar búskaparligar fyrimunir fyri ávikavist Føroyar og Danmark týdning.

Nevndin hevur víst á hesar møguleikar:

Danskir myndugleikar fáa trygd fyri ávísum forrætti bæði til danska arbeiðsmegi og til danskar veitingar til vinnuna.

Eitt alment partafelag við luttøku frá báðum síðum kann eisini tryggja, at báðir partar, umframt at fáa ávirkan á, hvussu útvinningarvirksemið verður lagt til rættis, eisini fáa lut í inntøkunum.

Verða inntøkurnar av møguligum útvinningarvirksemi so stórar, at eitt "rímiligt" býti ikki kann verða gjørt gjøgnum eitt tílíkt partafelag, er ein møguleiki, at føroyskir myndugleikar á ein ella annan hátt binda seg til at yvirtaka tey A-mál, ið enn ikki eru yvirtikin og møguliga eisini B-málini sambært nærri avtalu millum danskar og føroyskar myndugleikar. Verða inntøkurnar uppaftur størri, kunnu beinleiðis veitingar úr landskassanum til ríkisendamál verða umhugsaðar.

At enda hevur nevndin gjørt nakrar metingar um, hvussu ein samarbeiðsavtala partanna millum kann verða útint.

Tórshavn, tann 26. juli 1988

Árni Olafsson | Jalgrím Hilduberg

Halgir W. Poulsen